# Góð ráð um Swipp

Swipp er ein lættur, skjótur og tryggur gjaldmiðil. Tú kanst eisini sjálv/ur hjálpa til við at økja enn meira um trygdina á hesum gjaldmiðli, um tú fylgir ráðunum niðanfyri.

## Tá ið tú brúkar Swipp:

- Hugsa um fartelefonina sum reiðan pening. Goym tí fartelefonina á tryggum stað bæði úti og heima. Minst til at ansa eftir fartelefonini, á sama hátt sum tú ansar eftir tínum pengapungi
- Set kotu á fartelefonina, um hon hevur møguleika til tað. Lat ongan kenna tína kotu
- MINST TIL, at Swipp-flytingar kunnu ikki afturkallast – hevur tú flutt peningin, kanst tú ikki afturkalla flytingina
- Hald skil á, hvønn tú hevur sent peningin til. Goym boðini um Swipp á tíni fartelefon, inntil tú hevur kannað bókingarnar í netbankanum ella á kontuavritinum og kanna bókingarnar leypandi
- Kanna regluliga, um tú hevur mist fartelefonina ella SIM-kortið burtur

Legg til merkis, at tú kanst móttaka pening, sum tú ikki ynskir at móttaka. Kemur hetta fyri, skalt tú boða Eik frá hesum, so skjótt tú hevur varnast ta óynsktu gjaldingina.

## Missir tú fartelefonina burtur, ella er hon stolin:

Er fartelefonin burturmist ella stolin, skalt tú boða løgregluni frá sum skjótast. Tað skalt tú eisini gera, um tú hevur illgruna um, at onnur brúka tína fartelefon ólógliga.

Set teg í samband við Eik Banka beinanvegin og upplýs navn, bústað, p-tal og telefonnummar á tíni fartelefon. So verður atgongdin til Swipp steðgað beinanvegin.

## Nýtsla av Kallinavni:

Tá ið tú gert eina Swipp-avtalu, skalt tú velja eitt Kallinavn. Títt Kallinavn kann antin vera títt rætta navn ella eitt annað navn, sum tú ynskir at vera kend/ur undir, tá ið aðrir brúkarar skulu senda pening til tín ella móttaka pening frá tær. Tú kanst velja júst tað navnið, sum tú vilt, men navnið er ikki serstakt (tað merkir, at onnur kunnu velja sama Kallinavn, sum tú).

Tá ið tú sendir pening til eitt fartelefonnummar, fært tú Kallinavnið á móttakaranum, áðrenn tú sigur ja til flytingina. Hetta er ein eyka trygd fyri, at tú flytur peningin til tann rætta persónin.

Eini góð ráð er bert at flyta pening við Swipp til persónar, tú kennir ella hava kend Kallinøvn , sum samsvara við tær upplýsingar, tú hevur um móttakaran.